## Tony Blair heiðraður



Fyrrverandi bretski forsætisráðharrin, Tony Blair, varð í gjár í Washington, har amerikanski forsetin, George W. Bush, handaði honum amerikanska Frælsisheiðursmerkið fyri munagott arbeiði fyri friði og vælverui í heiminum. Í sambandi við handanina segði Bush, at hann metti Blair sum ein vinmann, ið ein kundi líta á, og hann nevndi bretska stuðulin til amerikanska bardagan ímóti yvirgangi. Umframt Blair heiðraði Bush fyrrverandi avstralska forsætisráðharran John Howard og forsetan í Kolombia, Alvaro Uribe.

## Løgreglumaður smuglaði

Ein fyrrverandi svenskur løgreglumaður er dømdur hálvt triðja ára fongsul, tí hann smuglaði 1,2 milliónir litrar av brenniolju úr Danmark til Svøríkis. Tað skrivar Aftonbladet. Sambært blaðnum smuglaði maðurin oljuna við einum skipi, sum er smíðað í 1913, men sum ikki hevur siglingarloyvi. Løgreglan í Halmstad avdúkaði smuglingina í september í fjør. Tá løgreglumenninir fóru umborð á skipið, vóru 144.000 litrar av danskari brenniolju umborð.

# Skeivt av sjúkrahúsunum

**– Eg havi ongan hoyrt enn, sum er komin við nøkrum fakligum atfinningum móti okkara tilmæli um ikki at eta grind, tí grind og spik er heilsuskaðilig fyri menniskju. Hinvegin havi eg hoyrt fólk siga, at hetta trúgva tey ikki ordiliga upp á. Men trúgv er ikki tað sama sum vitan, sigur granskarin, Pál Veihe**

GRIND
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*- Hevði eg verið læknastjóri í dag, hevði eg ikki latið sjúkrahúsini borðreitt við grind og spiki, sigur Pál Veihe, granskari*

Tíðin fer at vísa, hvussu nógv føroyingar fara at lurta eftir ráðunum hjá Pál Veihe, granskara og landslæknanum, Høgna Debes Joensen, sum herfyri mæltu føroyingum frá at eta grind og spik, tí gransking gjøgnum mong ár vísir, at grind er heilsuskaðilig og óegnað sum mannaføði.

Tá grind fyrr í hesum mánaðinum legði beinini í Hvannasundi eftir, at eingin grind var deyð í Føroyum seinasta hálvt annað árið, var einki, sum bendi á, at føroyingar sum heild ætla sær at fylgja heilsuráðunum.

Danskir fjølmiðlar gjørdu nógv burtur úr hesi grindini og vístu á, at hóast ávaringarnar hjá okkara heilsumyndugleikum, drepa – og eta - føroyingar framvegis grind.

Eitt nú Ekstra Bladet og Se & Hør skivaðu um grindadrápið og vístu til granskingarúrslitini hjá Pál Veihe um, at grindin er dálkað við kikssilvuri og PCB, og at hon tí ikki er egnað sum mannaføði.

Ein av teimum, sum altíð er við í grind, er Jústinus Olsen, djóralækni. Uppgávan hjá honum er at gera ymiskar uppmátingar og kanningar, tá grind verður hildin til.

Við Norðlýsið segði djóralæknin, at grindin, sum legði beinini í Hvannasundi, var sera væl fyri. Teir stóru hvalirnir sóu út til at vera væl í holdum, og hetta er eisini tann tíðin, tá grindin er upp á tað besta.

Blaðið spurdi eisini djóralæknan, um hann framhaldandi etur grind, tó at ávaringar eru um, at hon er heilsuskaðilig.

- Jú, tað geri eg. Eg haldi, at niðurstøðan, sum landslæknin hevur gjørt, er eitt alt ov langt lop frá úrslitunum frá vísindaligu ingunum. Sjálvur dámar mær væl at eta grind, og eg fari at halda fram við hesum, segði Jústinus Olsen við Norðlýsið.

### Einki fakligt

Herfyri tosaði Rás 2 við Pál Veihe, granskara, og spurdi hann, hvat hann heldur um tær atfinningar, sum hava verið ímóti tilmælinum um ikki at eta grind.

- Eg havi ongan hoyrt enn, sum er komin við nøkrum fakligum atfinningum móti okkara tilmæli. Hinvegin havi eg hoyrt fólk siga, at hetta trúgva tey ikki ordiliga upp á. Men trúgv er ikki tað sama sum vitan, leggur granskarin dent á.

Granskingarúrslitini, sum deildin hjá Pál Veihe er komin fram til, eru kunngjørd í altjóða tíðarritum.

- Vit hava tó ikki kunngjørt, at grindin er so illa dálkað, at fólk ikki eiga at eta grind meira. Tað er heldur ikki vanligt at kunngera slíkt í vísindaligum tíðarritum, tí tað er eitt mál, sum fólkaheilsumyndugleikarnir í teimum einstøku londunum taka upp.

Pál Veihe vísir á, at í USA hevur man bæði nógv og leingi umrøtt markið fyri kiksilvuri í eitt nú svørfiski og tunfiski, tó at kiksilvur í hesum fiski er nógv minni enn í grindahvali.

- Í USA høvdu vørur við so nógvum kiksilvuri sum í grind als ikki verið seldar.

Granskarin sigur, at tey meira enn 20 árini, hann hevur arbeitt við hesum kanningum, hevur hann samskift við ein hóp av føroyingum.

- Fleiri túsund føroyingar hava verið inni á deildini hjá mær til kanningar. Úrslitið av hesum er, at ein nógv meira nágreinilig frágreiðing er komin út til fólk, enn um kanningarnar bara snúðu seg um eitt ávíst mark-virði, sum verður kunngjørt av einum myndugleika – uttan frágreiðing.

### Nýtslan minkar

Pál Veihe heldur, at tað hevur eydnast teimum at kunna væl og virðiliga um vandarnar við at eta grind, og hann ásannar, at nýtslumynstrið hjá føroyingum, tá ið ræður um at eta grind, er rættiliga nógv broytt seinnu árini.

Hann vísir á, at eitt nú kvinnur, sum hava ætlanir um at gerast við barn – eru við barn ella sum geva bróst – stórt sæð allar siga, at tær halda seg frá at eta grind og spik.

- Tá hesar ikki eta grind, kemur tað heilt vist at breiða seg runt í samfelagnum, leggur hann aftrat.

Granskarin undrar seg ikki yvir, at fólk kortini í stórum tali fóru avstað at fáa sær grind, nú eingin grind hevði lagt beinini í so langa tíð.

- Nei, tað sigur mær ikki so nógv. Eg trúgvi, at grundleggjandi er føroyingurin, tá hann hugsar seg um, rationelllur, sum Pál tekur til.

Og hann heldur fram:

- Vit kunnu spyrja okkum sjálvi, hvussu trupult tað ikki hevur verið at borið boðskapin um, at tubbak er skaðiligt – og drepir. At roykja er óivað nógv skaðiligari enn at eta grind. Kortini er tað ein fjórðingur av føroyingum, sum roykja hvønn dag. So, hví skulu landslæknin og eg fáa eina slíka succes við einum boðskapi – at fólk skulu leggja knív og gaffil frá sær beinanvegin, tá ræður um grind og spik? spyr hann.

Pál Veihe vísir á, at kunningin um tað heilsuskaðiliga í at eta grind heilt vist fer at bera tann vegin, at nýtslan fer at fána burtur.

- Tá so nýtslan er minkað burtur í einki, verður grind ikki hildin til meira, tí føroyingar fara ikki at halda grind til bara til stuttleikar, leggur hann aftrat.

### Tað tekur tíð

At døma eftir fólkinum, sum møtti upp í Hvannasundi – og sum meldaði seg til at fáa grind, er ikki nógv sum bendir, at tey taka ávaringina hjá tær og landslæknanum serliga álvarsliga?

- Jú, tað haldi eg kortini. Eg tosi við so nógv fólk, og eg síggi millum yngra ættarliðið, at stórar broytingar eru á veg. Eg hevði hildið tað verið undarligt, um fólk ikki flokkaðust í grindini í Hvannasundi.

Granskarin sigur, at broytingar sum hesar, ganga ikki í stórum lopum. Tær ganga í staðin spakuliga fyri seg.

Ein av teimum fyrstu seðlunum, sum vórðu róptir

